solorka
TÍN VERTUR ÚTI Í VERÐINI

# Nógvir møguleikar í grannalagnum



## Mundomar

er ein djórapark, har børn, ung og vaksin kunnu njóta ymisk sløg av súgdjórum, fuglum og skriðdjórum. Parkin hevur fleiri spennandi framførslur, og viðhvørt ber eisini til at svimja við sjóleyvum og springarum.



## Terra Mitica

Í útryðjuni av Benidorm er stóra stuttleikaparkin við teimum mongu møgu-leikunum fyri bæði stór og smá, djørv og minni djørv. Stutt og bíligt er at koyra higar í hýruvogni.





## Altea

Gamli grannabýurin er ein hin vakrasti í øllum Spania. Her er hugnaligt at fáa sær ein bita ella ein kaffimunn. Tað ber til at taka býbussin ella ein hýruvogn.



# Vakrar útferðir

Tilval



## Guadalest

Hálvdagstúrur til eina av mest vitjaðu bygdunum í Spania. Við skansanum á undarligu tindunum er plássið spennandi, og útsýnið oman til Miðjara-havið er frálíkt.





## Fonts d'Algar

Hálvdagstúrur til vakra fossalendið, har tað er lagamanni hjá barna-familjum og ungum at hugna sær, leypa á bláman og svimja – enntá inn um ein av fossunum.





## Valencia

Heildagstúrur til triðjastørsta býin í Spania. Her eru gamli býarparturin, gitni futuristiski lista- og vísindabýurin og katedralurin við gitna kalikinum, sum Jesus brúkti undir heilagu kvøldmáltíðini

